LANDSVERK
byggir land

FJØLBROYTT SERFRØÐI

EWALD KJØLBRO
Stjóri, Landsverk

Frá teori til praksis

Arkitektar, verkfrøðingar, teknikarar, fíggjarfrøðingar og fólk við nógvum øðrum útbúgvingum.

Við 140 starvsfólkum er Landsverk ikki bert eitt av landsins størstu arbeiðsplássum, men eisini millum teirra, sum hava mestu serfrøðina savnaða undir einum taki.

Landsverk er eitt fjølbroytt arbeiðspláss. Starvsfólkini byggja vegir, brýr, havnir og tunlar, máta veður og vind og gera kanningar og rannsóknir. Tey fylgja verkætlanum frá teori til praksis. Líka frá fyrstu skitsuni, og inntil landsstýrisfólkið stendur í sjónvarpinum og klippir snórin til lidnu verkætlanina. Hetta krevur fólk við góðum fakligum førleika. Fólk við teimum røttu pappírunum.

Sum nýklaktur verkfrøðingur, arkitektur, teknikari ella við øðrum prógvi í hondini stendur tú kanska sjálv/-ur og skal taka lopið frá teori til praksis. Tá er Landsverk ein fínur møguleiki at byrja yrkisleiðina við. Gull og grønar skógir kunnu vit ikki lova. Men hevur tú hug at flyta fjøll, so er tað eitt gott hugskot at byrja á Landsverki. Fakligu avbjóðingarnar eru stórar og fjølbroyttar, og fakliga umhvørvið ríkt. Og Landsverk er so nógv meira enn asfalt og betong. Sum partur av serfrøðingaliðnum verður tú ikki bara við til at skapa verkætlanir, sum síggjast aftur, tá snórurin verður kliptur. Tú verður við til at skapa fortreytir fyri framhaldandi menning av føroyska samfelagnum. Tú verður við til at byggja land.

Útgevari: Landsverk, desember 2011
Lagt til rættis: Stjórnardeildin á Landsverki
Myndir: Kristfrið Tyril/Momo, Bárður Eklund o.o
Sniðgeving, umbróting og liðuggerð: Sendistovan

Tú kanst útvega tær eintøk av hesum blaði við at venda tær til:

Landsverk
Tinghúsvegur 5
FO-100 Tórshavn
Tlf. 340 800
www.lv.fo

UPPGÁVURNAR HJÁ LANDSVERKI



BIRITA WARDUM
Arkitekur, Byggideildin

Landsverk er stovnur undir Innlendismálaráðnum, og líka síðani byrjanina í 1948 hevur Landsverk fyrisitið byggitekniskar uppgávur fyri land og kommunur. Í dag eru uppgávurnar nógvar og fjølbroyttar. Hóast starvsfólkatalið er minkað nógv seinnu árini, er Landsverk við sínum 140 starvsfólkum framvegis eitt av størstu arbeiðsplássum í Føroyum

Á stovninum arbeiða verkfrøðingar, arkitektar, teknikarar, fíggjarfrøðingar, skrivstovufólk, kunningar- og hr-fólk og fólk við nógvum øðrum útbúgvingum.

Stovnurin hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur. Hann er byggiharri fyri stórum almennum byggiverkætlanum so sum tunlum, vegum, brúm og bygningum. Stovnurin er ráðgevi hjá myndugleikum og ger ætlanir og forkanningar í sambandi við landsvegir, havnir, bygningar, tyrlupallar og flogvøllir.

Stovnurin útinnir ætlanir á hesum økjum, og stendur somuleiðis fyri rakstri og viðlíkahaldi.

Landsverk hevur eisini fleiri tænastur, sum borgararnir merkja meira beinleiðis í gerandisdegum. Stovnurin framleiðir asfalt, sum fer á almennu vegirnar, og skerv, sum fer á gøtur og tún ella til okkurt byggivirksemi.

Landsverk mátar veður og vind, streym og aldu, fjøru og flóð og ger botnkanningar.

Um veturin ruddar Landsverk vegirnar fyri kava og kunnar fólk um koyrilíkindi. Landsverk tekur sær eisini av vegamerkingum og vegaskeltum og upplýsir um ferðslutrygd.

Eisini umsitur stovnurin øll aliloyvi í landinum.

UNA DJURHUUS CHRISTIANSEN
HR-ráðgevi, Stjórnardeildin

ARBEIÐI, SUM GER MUN

Landsverk er ein stovnur, sum hevur og krevur nógv fólk við fakligari vitan. Starvsfólkahópurin fevnir um ein stóran fakligan ymiskleika. Til dømis eru í løtuni 15 verkfrøðingar í starvi, umframt arkitektar, byggifrøðingar og onnur við hægri akademiskum útbúgvingum. Harumframt hava fleiri starvsfólk aðrar tekniskar útbúgvingar, eins og fleiri skrivstovufólk og handverkarar starvast á stovninum. Hetta eru øll starvsfólk, ið á hvør sínum øki hava upparbeitt sær nakrar førleikar, ið umboða eina sera fjølbroytta serfrøði.

Arbeiðsumhvørvið er tískil sera fakligt, og setur hetta stór krøv til starvsfólkini, men tað gevur eisini góðar møguleikar fyri fakligari menning og samstarvi upp á tvørs av fakmørkum, sigur Una Djurhuus Christiansen, HR-ráðgevi. Hon heldur, at fyrimunurin við at arbeiða á Landsverki er, at hetta er eitt arbeiði, sum veruliga gevur meining. Eg kenni tað sum ein spennandi framíhjáræt at arbeiða á einum almennum stovni, sum varðar av økjum, ið skapa beinleiðis virði fyri allar borgarar í landinum. Tú ert við at skapa varandi virðir í samfelagnum. Okkara fólk byggja til dømis vegir, skúlar og havnir og eru sostatt við til at skapa fortreytir fyri samfelagsmenningini. Tey gera eitt arbeiði, sum veruliga munar. Tú kanst siga, at tey øll eru við til at byggja land, sigur HR-ráðgevin á Landsverki.

SIGURD LAMHAUGE
El-verkfrøðingur, Framleiðsludeildin
Leiðari fyri tunnils- og strikuliðnum

EG KOMI NÓGV RUNT Í LANDINUM

Framleiðsludeildin er tann útinnandi entreprenørdeildin á Landsverki. Vit hava ymiskar verkætlanir, sum verða gjørdar fyri sjálvan stovnin. Onkuntíð bíleggja onnur uppgávur uttan fyri húsið, men eg vil siga, at kanska 90 prosent av teimum uppgávum, vit loysa, eru fyri Landsverk.

Eg eri verkfrøðingur, og sum slíkur er mín uppgáva at fyrireika arbeiðir. Tá vit fáa eitt arbeiði, fyrireiki eg hesa uppgávu, so at menninir, ið skulu taka sær av tí praktiska partinum, altíð vita, hvat teir skulu gera, hvussu teir skulu gera, og at teir hava neyðuga tilfarið. Til dømis betong, asfalt, boltar, maskinur, amboð o.s.fr. Hetta fyri at avgreiða uppgávurnar best møguligt og fyri ein prís, sum er kappingarførur við eitt og hvørt annað virki. Okkara fólk eru bæði kappingarfør og minst líka dugnalig fólk sum í tí privatu vinnuni.

Eg eri rakstrarleiðari, havi ábyrgd av tunnilsliðnum og øllum strikiarbeiðum á samlaða landsvegakervinum. Til tað krevst vanligur verkfrøðiligur førleiki, at tú dugir at stýra tíð og pengum og at lýsa trupulleikar soleiðis fyri arbeiðsmonnunum, at teir skilja tað og fáa loyst uppgávurnar. Tú skalt evna at formidla tað, sum tú vilt hava gjørt, og fáa fylgiskap frá teimum fólkunum, sum skulu gera arbeiðið. Tað er ein treyt at hava fakliga virðing fyri hvørjum øðrum. Tú skalt duga at umsita eina uppgávu, frá tí hon er á pappírinum, til hon verður útint í verki.

Tað er neyðugt at vera nógv úti og fáa hesar uppgávurnar í gongd, og tí komi eg nógv runt í Føroyum. Allastaðni, har tað eru tunlar í Føroyum, eri eg.

SUM BYGGIFRØÐINGUR HUGSI EG PRAKTISKT

Eg havi 25 ár á baki í sambandi við bygging í serliga privatu byggivinnuni og bygningsumsiting. Hesar royndir koma væl við, nú eg starvist á Landsverki, ið eftir mínum tykki er eitt væl skipað arbeiðspláss.

Sum einsamallur byggifrøðingur á bygningadeildini samstarvi eg dagliga við fýra arkitektar, ein byggimálsviðgera og ein byggiverkfrøðing. Mín styrki sum byggifrøðingur er, at eg hugsi praktiskt og havi breitt innlit í byggiteknisk og fíggjarlig viðurskifti. Serliga styrkin hjá arkitektunum er tað arkitektoniska, og samstarvið hjá okkum er tí bygt á, at vit hava ymsar styrkir, og hetta førir til góð kjak og framsøknar loysnir.

Eg varði av nøkrum føstum verkætlanum innan bygningsviðlíkahald og havi ábyrgdina av, at bygningarnir verða viðlíkahildnir og dagførdir í mun til fíggjarliga játtan og ymisk teknisk, arkitektonisk og onnur faklig viðurskifti og krøv. Talan er um ógvuliga ymiskar bygningar; sjúkrahús, røktarheim, skúlar, almennar skrivstovubygningar og so framvegis.

Tað besta við at starvast á Landsverki er, at eg veruliga kenni, at mínar royndir innan bygging verða nýttar á stovninum. Hesar royndir koma væl við, tá eg geri støðumetingar og meti um viðlíkahald av eldri bygningum, eins og tær hóska væl saman við royndunum hjá mínum starvsfeløgum, ið eg altíð kann sparra við og læra frá.

GUNNAR GUNNARSSON
Byggifrøðingur, Byggideildin

PERSÓNLIGT ÁGRÝTNI STÓRAN TÝDNING

„Eitt starv sum mítt krevur, at tú ert persónliga ágrýtin og hevur áhuga í at samstarva við fólk …“

Tá eg fyri tveimum árum síðani byrjaði á Landsverki, setti stovnurin hol á uppgávuna at orða eina føroyska bygningsreglugerð. Eg havi nærum burturav arbeitt við at samskipa hetta arbeiðið, ið hevur til endamáls at lyfta føroyska bygging upp á eitt hægri stig og harvið raðfesta trygd, dygd og estitikk. Ein sera áhugaverd uppgáva, ið vit loysa í samstavi við vinnuna og aðalráðini.

Eg havi eisini aðrar uppgávur. Til dømis geri eg byggiskráir, viðlíkahalds- og sniðgevarauppgávur og ymisk tilmæli.

Eitt starv sum mítt krevur, at tú ert persónliga ágrýtin og hevur áhuga í at samstarva við fólk, og at tú ert áhaldin, tá tú av ymsum orsøkum rennur teg inn í múrar. Harafturat skalt tú sjálvandi hava eina byggitekniska vitan og arkitektoniskan ans fyri tí.

Eg var nýútbúgvin, tá eg byrjaði á Landsverki. Tí hevði eg – og havi enn – nógv at læra, men her eru nógv fólk við bæði drúgvum og ymiskum royndum, og her er altíð onkur við stórari byggitekniskari vitan at sparra við. Hetta hevur gjørt, at mín vitan bara er vaksin, síðani eg kom í starvið. Eg flyti og menni meg alla tíðina.

Eg haldi, at Landsverk er ein framsøkin stovnur, ið vil vera í fremstu rød. Sum starvsfólk fært tú sera stóra ábyrgd, og leiðslan himprast ikki við at vísa áhuga í at menna starvsfólkini og lata tey ávirka sítt arbeiði. Til dømis við formans- og leiðsluskeiðum, menningarsamrøðum, avbjóðandi uppgávum og einum óformligum arbeiðsumhvørvi á høgum, fakligum stigi.

FØROYAR – EIN BÝUR Í HEIMSSAMFELAGNUM

LANGTÍÐARÆTLAN: Tað skal í mesta lagi taka ein tíma at koyra til Havnar úr støðum, har landfast er. Annars í mesta lagi hálvan triðja tíma. Fyri fyrstu ferð er ein langtíðarætlan løgd fyri samferðslukervið, sum skal minka um fjarstøðuna og økja flytførið í Føroyum

Skjótt, lætt, gott, smidligt og trygt

Hetta eru nakrir av hornasteinunum í samferðsluætlanini 2008–2020, sum ein arbeiðsbólkur undir táverandi Vinnumálaráðnum (nú Innlendismálaráðnum) gjørdi í 2001. Ein framtíðarætlan, sum setur út í kortið, hvussu vit á skilabestan hátt útbyggja framtíðar samferðslukervið í Føroyum. Eitt vælvirkandi samferðslukervi hevur sera stóran týdning fyri samfelagið. Serliga fyri eitt oyggjaland sum okkara, ið er samansett av sundum og firðum.

Samferðslukervið og flutningsmøguleikar eru avgerandi fyri, hvar fólk vilja arbeiða og búgva. Hvar virkir, stovnar, mentanarhús og onnur tilboð til borgaran verða staðsett. Tey eru avgerandi fyri trivnaðin, og í síðsta enda í hvønn mun samfelagnum verður lív lagað.

Tískil er gjørd ein samferðsluætlan. Ein umfatandi langtíðarætlan, sum skal tryggja, at framtíðaríløgurnar í føroyska samferðslukervið, til dømis vegir, ferjur, tunlar, brýr og floghavnir, verða raðfestar so skilagott, sum til ber. Alt samalt, so samfelagið kann fáa sum mest fyri pengarnar, og flutningskervið altíð lýkur tað, sum samtíðin og borgararnir krevja.

Føroyar sum ein býur

Samferðsluætlanin er ambitiøs. Hon hevur til endamáls at umskipa samferðslukervið, so Føroyar í framtíðini í roynd og veru fara at virka sum ein býur í heimssamfelagnum.

Nú skal hetta ikki skiljast soleiðis, at ætlanin er at miðsavna allar føroyingar í Havn, men mælt verður til at stytta ferðatíðina millum allar partar av landinum. Ferðatíðin skal gerast so stutt, at hon kann sammetast við flutningstíðina hjá teimum, sum búgva í stórbýum aðrastaðni. Tað skal við øðrum orðum ikki vera nakar stórvegis munur at búgva í útjaðaranum í einum stórbýi og so á eini útoyggj í Føroyum. Frástøðan til miðdepilin skal vera tann sama.

Grundgevingin er einføld. Føroyingar eru ikki øðrvísi enn onnur. Vit krevja at fáa lut í teimum tilboðum, sum nútíðin og býurin hava at bjóða. Av tí at tað ongantíð verður møguligt at hava øll hesi tilboð allastaðni í landinum, er tankin at binda landið so væl saman, at tað í roynd og veru fer at virka sum ein felags býur. Samstundis er hugsanin at gera tað lætt at ferðast millum Føroyar og umheimin. Tað skal t.d. bera til at búgva í Føroyum og arbeiða uttanlands. Tí skal tað vera lætt at koma til flogvøllin, og flogvøllur og flogsamband skulu vera góð. Á tann hátt nærkast vit hugsjónini um Føroyar sum ein bý í heimssamfelagnum.

Eitt høvuðsvegakervi

Sambært samferðsluætlanini skal skipast eitt høvuðsvegakervi, sum skal raðfestast fram um aðrar vegir. Høvuðsvegirnir skulu fáa bestu kavaruddingina. Teir skulu altíð vera opnir, og vegirnir, sum í dag ganga ígjøgnum bygt øki, skulu leiðast uttan um bygdir og býir.

Hegn verða sett upp, sum skulu halda seyði burtur frá høvuðsvegnum. Teir skulu liggja lágt og hava fáar brekkur. Tað skal snøgt sagt vera skjótt, trygt og gott at koyra á høvuðsvegunum. Fortreytirnar fyri samferðsluætlanini eru m.a., at Eysturoyartunnilin og Sandoyartunnilin verða gjørdir. Tunlarnir verða ein týðandi táttur í høvuðsvegakervinum.

Skjóttgangandi ferjur

Sambært samferðsluætlanini skal ferðafólkaflutningur á smærru farleiðunum í framtíðini vera fyri seg, og flutningur av farmi fyri seg. Mælt verður til at útvega skjóttgangandi og góðar ferjur til ferðafólkaflutningin. Til farmaflutning verður mælt til at útvega eitt serligt skip, sum burturav skal flyta farmin í allar oyggjarnar.

Pendlararapláss

Málið í samferðsluætlanini er at betra flytførið, t.e. at gera tað lættari hjá fólki at koma úr staði í stað. Í hesum sambandi er ætlanin at gera almennu ferðsluna til eitt veruligt alternativ til privatbilismuna.

Busssambandið skal vera gott á høvuðsvegakervinum, og harumframt er ætlanin at bjóða pendlarunum góðar umstøður.

NØKUR STRATEGISK MÁL

- **0-hugsjónin skal vera grundarlag undir øllum ferðslutrygdararbeiði**
- **Flutningstíðin til støð, har fólk hava sína dagligu gongd, so sum til handils, lækna, posthús og banka skal vera í mesta lagi ein hálvan tíma**
- **Flutningurin millum Tórshavn og flogvøllin skal taka í mesta lagi 35 minuttir.**
- **Floghavnin verður útbygd**
- **Røkja møguleikarnar fyri at byggja gongu- og súkklubreytir**
- **Raðfesta góðar listfrøðiligar loysnir, tá íløgur verða gjørdar í flutningskervið**

Ein slík samferðsluætlan má við jøvnum millumbilum dagførast, tí umstøður og krøv broytast. Innlendismálaráðið hevur sett hetta arbeiðið í gongd, og ein dagførd langtíðarætlan fyri samferðslukervið fyri árini 2012–2024 verður liðug várið 2012.

Ein kanning frá 2006 vísir, at umleið 2.700 fólk í Føroyum pendla dagliga til samans 253.762 km. Tað merkir, at hvør einstakur pendlari ferðast í miðal 94 km dagliga.

Tí er ætlanin at gera pendlarapláss, sum liggja høgliga fyri. Har kunnu fólk seta bilin ella súkkluna frá sær, so at tey kunnu halda leiðina fram – antin í bussi ella í persónbili saman við øðrum pendlararum. Samstundis verður mælt til at stovna ein serligan pendlaraportal á internetinum, so pendlararnir kunnu gera avtalur sínámillum um at koyra saman til arbeiðis.

Eitt fet frammanfyri

Tað er tó ein óreingiligur veruleiki, at fólk nú á døgum vilja vera so fræls, sum til ber. Tey vilja vera óbundin av tíð og staði, og samstundis verða mørkini støðugt flutt millum privatlív og arbeiðslív.

Hetta hava tey, sum hava gjørt Samferðsluætlanina 2008–2020, havt fremst í huga. Sambært teimum er ímyndin og málið í hesi framsøknu ætlan – Føroyar, ein býur í heimssamfelagnum – ikki nakað akademiskt luftkastell. Tvørturímóti. Hetta er nakað, sum neyðugt er at taka í størsta álvara í framtíðar útbyggingum av samferðslukervinum, skulu Føroyar klára at liva upp til tey krøv, sum framtíðin og fólk fara at seta. Tískil er samferðsluætlanin ein roynd at flyta Føroyar tann rætta vegin. Miðvíst framá.

LANDSVERK byggir land

GÓÐSKUEFTIRLIT

ASFALTKANNINGAR Í HUNDSARABOTNI

ROYNDARSTOVA: Asfalt- og skervverkið hjá Landsverki í Hundsarabotni framleiðir millum 25.000 og 30.000 tons av asfalti árliga. Leiðarin á royndarstovuni, Jónleif Joensen, hevur eftirlit við, at asfaltið lýkur tey sera neyvu góðskukrøv, sum sett verða til vøru og framleiðslu

Allir vegir føra til Rom, og í Føroyum ganga flestu vegir gjøgnum ein og sama mann, Jónleif Joensen. Í hvussu so er, um asfaltið á vegnum er framleitt á asfalt- og skervverkinum í Hundsarabotni.

Á skrivstovuni hjá Jónleivi er bókahillin full av ringbindum, sum rúma avrit av fleiri túsund stakroyndum. Royndir, sum góðskueftirlitsmaðurin á reyðu royndarstovuni í Hundsarabotni hevur tikið av føroyskari asfaltframleiðslu tey seinastu mongu árini.

Hetta er samstundis eitt sera hent yvirlit yvir, hvørji sløg av asfalti, sum eru nýtt til teir almennu vegirnar í Føroyum. Eitt slag av sporførisskipan, sum ger, at Jónleif Joensen altíð kann upplýsa arbeiðsformonnum kring landið, hvat slag av asfalti, teir skulu koyra á vegirnar, tá vegirnir skulu gerast av nýggjum.

Tí asfalt er ikki bara asfalt. Tað eru vísindi fyri seg, og Jónleif Joensen tryggjar, at uppskriftin er tann rætta, og at øll góðskukrøv verða fylgd.

Dagligar stakroyndir

Einki størri asfaltarbeiði verður sett í verk, uttan at royndarstovan hevur staðfest, at asfaltið er í lagi, sigur Jónleif Joensen. Tað finnast einar 16 uppskriftir upp á asfalt. Asfalt er ein blandingur av oljuevninum bitumen, ið hevur avloyst heilsuvandamiklu tjøruna. Blandingin valdast um, hvørt asfaltið skal á eitt tún, á eina gongubreyt, á eitt parkeringsøki ella á landsvegin. Skal tað á vegin, veldst blandingin um slag av asfalti, og hvussu nógv og tung ferðslan er.

Eisini finst reytt asfalt, og tá er jarndioxid koyrt í. Øll framleiðsla fylgir neyvum forskriftum, sum eru standardir, ið verða brúktir í grannalondunum. Einki verður latið til tilvildina, tí vánaligir vegir kunnu gerast ein ógvuliga dýr søga fyri landið.

Hetta er eitt áhugavert og fjølbroytt arbeiði. Eg komi í samband við sera nógv fólk, sigur Jónleif Joensen. Hann heldur, at starvið hóskar væl til fólk við tekniskari útbúgving.

Marshall-kanning

Á royndarstovuni verður hvør steinur vigaður og vendur. Í kúlukvørnini verður staðfest, um skervurin í slitlagnum hevur røttu slitstyrkina, so asfaltið klárar píkadekkini. Í dag er tað bara basaltið úr grótbrotinum í Porkeri og norskt granitt, sum klára royndina. Ein sokallað Marshall-kanning verður nýtt at eftirkanna asfaltið fyri góðsku og eginleikar av øllum handa slagi. Asfaltið verður hitað upp í 800 stig, so bitumentilfarið kolast upp. Dustið, sandurin og skervurin, sum liggja eftir, verða síðani sáldað fyri seg, og kannað verður, um lutfallið millum tilfarið er tað rætta.

Eisini verður kannað, hvussu asfaltið stendur fyri trýsti. Tað verður gjørt við at stempla asfaltið saman til ein grótharðan klump, og síðani verður roknað út, hvussu nógv tað hevur givið seg.

Asfaltið má hvørki verða ov hart ella ov bleytt, eins og stabilitetur og deformatión skulu vera í lagi. Eisini verður mált, hvussu stór holrúmini eru í asfaltinum. Evnistyngdin á skervinum verður kannað, og brotstyrkin í asfaltinum verður skrásett. Alt samalt eftir føstum standardum. Um tey ymsu Marshallvirðini ikki verða fylgd, verða rættingar gjørdar saman við blandimeistaranum.

Okkurt óvæntað kann hava stungið seg upp á verkinum, so lutfallið ikki verður tað rætta. Hol kann vera komið á okkurt sáldið. Tað kann eisini vera, at vart verður gjørt við, at asfaltið, sum teir hava koyrt á vegin, er ov feitt. Tað er ein stór avbjóðing at avdúka feilin, sigur Jónleif Joensen.

JÓNLEIF JOENSEN

Hevur útbúgving sum tekniskur teknari í Danmark og arbeiddi nøkur ár hjá donsku fyritøkuni FL Smith. Síðani hann kom í starv á royndarstovuni í Hundsarabotni, hevur hann verið á fleiri skeiðum innan royndarstovuarbeiði og góðskutrygging í sambandi við asfaltframleiðslu.

„Tað er stuttligt at arbeiða við einum øki, sum kann fáa so stóran týdning fyri so nógv fólk. Vit ferðast jú øll í ferðsluni“

RANNSÓKNIR

HON TEKNAR FØROYSKA HAVBOTNIN

HÁTØKNI: Anne Marie Norby kennir firðir og sund betur enn tey flestu. Við neyvleika niður í sentimetrar ger hon saman við starvsfeløgum kanningar av havbotninum, eitt nú tá havnir skulu byggjast og sjókort teknast.

Ein lítil hátøkniligur depil, ið savnar dátur, bæði til kortlegging og simuleringar av framtíðar útbyggingum. Soleiðis kann ein partur av virkseminum á deildini fyri infrakervi á Landsverki lýsast við fáum orðum.

Millum starvsfólkini á deildini er Anne Marie Norby. Hennara arbeiðsuppgávur fevna millum annað um at gera forkanningar av havbotninum í økjum, har ætlanin er at byggja havnir. Saman við starvsfeløgum á deildini fyri infrakervi savnar hon dátur, ið verða brúktar til simuleringar av, hvussu streym- og alduviðurskifti og umhvørvið annars við nýggj havnarøki fer at síggja út. Tey fóðra aðrar myndugleikar við mátingum av havbotninum á firðum og sundum, so sjókortini kunnu dagførast.

Sær hvønn stein

Nýggj útgerð hevur at kalla kollvelt arbeiðið hjá Anne Marie Norby og hinum á deildini. Fyri fáum árum síðani fingu tey eina sera framkomna fleirstráluskipan, ið kann skanna havbotnin við neyvleika niður í sentimetrar.

Multibeam System skipanin lýkur øll altjóða krøv til sjóuppmáting. Skipanin er í dag eitt týdningarmikið amboð hjá Landsverki í allari uppmáting av havbotninum og gevur harumframt stovninum og starvsfólkunum nýggjar avbjóðingar og møguleikar.

Tað er onkursvegna eitt slag av rannsóknarferð, hvørja ferð vit fara við nýggju útgerðini út á firðir og sund at gera uppmátingar, sigur Anne Marie Norby.

Túrarnir við Nísuni – AWI 570 glasfipurbátinum hjá Landsverki, sum er serbygdur til endamálið – eru ikki so fáir, tá veðrið annars er til vildar.

Henni dámar væl túrarnar, ið eru nakað heilt annað enn teir mongu tímarnir á skrivstovuni, sum fara við at viðgera mátingar og tær dátur, ið spyrjast burturúr.

Viðhvørt koma eisini seruppgávur í ordrabókina, sum krydda arbeiðsdagin. Anne Marie Norby hevur verið á Lambavík við síni serútgerð og leitað eftir leivdum av Norsku Løvu. Hetta hendi eftir umbøn frá Statoil-Hydro í sambandi við eina kanningarferð hjá nøkrum jarðfrøðingum, ið vildu hava neyvar uppmátingar av økinum, har danska skipið fórst nýggjársaftan 1707.

Somuleiðis hevur hon kannað, hvussu havbotnurin sær út á leiðini við Flesjarnar, har vrakið av russiska trolaranum Olshanu liggur. Mátingarnar vóru partur av útbjóðingartilfarinum í sambandi við, at oljan møguliga skuldi takast úr skipinum.

Anne Marie Norby hevur gjørt uppmátingar í Svínoy í sambandi við eina møguliga víðkan av verandi havn. Tey hava gjørt uppmátingar fyri Runavíkar havn, mátingar í sambandi við at SEV skal leggja nýggjar kaðalar millum oyggjar, og so hava tey gjørt mátingar í sambandi við skaðan á havnarlagið í Hvalba. Hetta er eitt arbeiði við stórum og fjølbroyttum avbjóðingum. Tað kann vera eitt sindur rokaligt viðhvørt, og tað dámar mær væl. Og so eigi eg jú eisini mín part í øllum stórum havnarbyggingum, tí eg kenni hvønn stein undir teimum, sigur hon brosandi.

„Tað er onkursvegna eitt slag av rannsóknarferð, hvørja ferð vit fara við nýggju útgerðini út á firðir og sund at gera uppmátingar“

ANNE MARIE NORBY

Hon er útbúgvin landmálarateknikari og hevur áður arbeitt hjá Teknisk Forvaltning og einum landinspektøri í danska býnum Struer. Anne Marie hevur arbeitt 27 ár á Landsverki. Hetta tíðarskeið hevur hon millum annað nomið sær eftirútbúgving frá Sjøkartverket í Stavanger.

Landsverk er byggiharri á Føroya størstu byggiverkætlan nakrantíð. Talan er um komandi Skúladepilin við Marknagil, ið fer at hýsa Føroya Studentaskúla, Føroya Handilsskúla og Tekniska Skúla. Nýggi miðnámsdepilin, sum verður tikin í nýtslu við skúlaársbyrjan í 2016, verður 19.000 fermetrar til støddar og fær pláss fyri 1.300 næmingum. Kostnaðurin er settur til 391 mió. krónur, men tá er innbúgv og annað ikki tikið við

EIN STOVNUR VIÐ ÁVIRKAN

SAMFELAGSVIRÐIR: Landsverk verður oftast sett í samband við stórar verkætlanir: brýr, tunlar, vegir og skúlar. Men vit hoyra sjáldan um fyrilitini, sum Landsverk má hava fyri lendis- og borgaraviðurskiftum, trivnaði og estetikki. Tann parturin er rættiliga stórur, sigur mannfrøðingurin Firouz Gaini, sum sjálvur annar skrivaði bókina „Mynstur broytast – Landsverk bygt land í 60 ár“

Sama er við avbjóðingunum, sum alsamt broytast og gerast fleiri, sigur Firouz Gaini, ið sær Landsverk sum serstakan í føroysku vinnuni. Tætta tilknýtið til politikkin og landsumsitingina hevur nakað heilt serligt við sær og setir krøv til tillaging og starvsfólk.

Mannfrøðingurin heldur eisini, at stovnurin við sínum fjølbroytni er við til at gera føroyska arbeiðsmarknaðin meira áhugaverdan.

Hørð og bleyt virði

Landsverk er altíð partur av nýggjasta rákinum og tískil við til at byggja, broyta, og modernisera landið. Stovnurin setir politiskar avgerðir í verk, men ávirkar hinvegin eisini avgerðirnar við uppskotum og fakligum grundgevingum.

Landsverk spennir víða og tekur lut í flestu verkøkjum, samstundis sum tíðarrákið hevur broytt stovnin innanífrá. Meira enn nakrantíð fyrr umboðar Landsverk eisini bleytu virðini. Tá stórar verkætlanir verða gjørdar, verða fyrilit tikin fyri umhvørvi, náttúru, byggilist/fagurfrøði og trivnaði. Stór tilvitan er nevniliga um tann partin.

Tað er ikki serliga løgið, tí Landsverk hevur oftast prosjektleiðsluna í verkætlanum, sum gera stór inntriv og kunnu broyta bústaðar-, skúla- og arbeiðsmynstrini í bygdum og oyggjum. Ja, sjálvt seyðurin má mangan laga seg til nýggjar tíðir. So ávirkanin er stór, og tað setir eisini krøv til trygd á øllum økjum. Í veruleikanum má Landsverk hava fyrilit fyri øllum í samfelagnum, sigur Firouz Gaini.

Arbeiðsplássið Landsverk

Firouz Gaini metir, at Landsverk er eitt spennandi stað at hava ambitiónir, tí arbeiðsøkið er so fjølbroytt. Harafturat liggur Landsverk inni við stórari vitan, sum stovnurin hevur ognað sær gjøgnum vunnar royndir her heima og sum virkin partur av altjóða samstarvi. Til dømis í NVF, Norrønt Vegforum.

Landsverk er eitt stórt arbeiðspláss, har fleiri yrkisbólkar starvast, eisini aðrir enn verkfrøðingar. Sum er, verður nógv prosjekterings- og simuleringsarbeiði gjørt við teldu. Og hugsast kann, at telduparturin fer at krevja enn størri serfrøði í framtíðini. Sama er á øðrum starvsøkjum, so samanumtikið hevur virksemið hjá Landsverki stóran týdning fyri útboðið á føroyska arbeiðsmarknaðinum. Men tað er eisini ein øgilig menning, sum er farin fram síðan byrjan, sigur Firouz Gaini.

Landsverk er altíð undir trýsti, tí stovnurin hevur eina lyklastøðu í almennari bygging í Føroyum. Men stovnurin er nógv nýmótansgjørdur og avspeglar broytingar, sum eru farnar fram úti í samfelagnum. Eisini veit leiðslan, at fyri at lokka dugnalig starvsfólk, mugu trivnaður og møguleikar fyri endurútbúgving raðfestast høgt. Landsverk hevur nevniliga stóra kapping á starvsfólkaøkinum; ikki bara frá byggifyritøkum, men eisini øðrum vinnugreinum, har eftirspurningurin er stórur eftir eitt nú verkfrøðingum og fólki við leiðsluroyndum, sigur Firouz Gaini.

Meira kann lesast um samfelagsávirkanina hjá Landsverki í bókini Landsverk 60 ár, sum Firouz Gaini skrivaði saman við Helga Jacobsen, blaðmanni. Bókin fæst í bókhandlum kring landið.

> „Landsverk er í harðari kapping um tey dugnaligu starvsfólkini. Leiðslan veit, at fyri at lokka dugnalig starvsfólk til stovnin, mugu trivnaður og møguleikar fyri endurútbúgving raðfestast høgt“
>
> **Firouz Gaini, mannfrøðingur**